# Íløgur skulu vera etiskar




*Lívstrygginin setir nú etiskar leiðireglur fyri, í hvørjar fyritøkur pensjónsuppsparingar kunnu plaserast í*

*Savnsmynd*

**Føroya Lívstrygging hevur gjørt av, at felagið ikki skal gera íløgur í ídnað, ið framleiðir eitt nú tubbak og vápn**

ÍLØGUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinastu dagarnar hevur Kringvarpið sett fokus á íløgupolitikkin hjá Føroya Lívstrygging. Serstakliga við atliti til, at felagið ikki hevur etiskar leiðreglur um íløgurnar. Og eitt nú eru føroyskar pensjónsuppsparingar settar í virðisbrøv hjá tubbaks- og vápnaframleiðarum.

Nevndin hevur á fundi umrøtt hesi viðurskifti og er samd um, at felagið ikki skal gera íløgur í ídnað, ið framleiðir tubbak, vápn og líknandi.

Nevndin tekur málið í størstum álvara og heilsar kjakinum um etiskar íløgur vælkomnum. Føroya Lívstrygging vónar, at hetta kann verða høvi til at fáa eitt breitt kjak um, hvussu íløgur eiga at umsitast. Trupulleikin viðvíkjandi etiskum íløgum er nakað, ið allir eftirlønarveitarar, tryggingarfeløg og pensjónsstovnar, umframt almennir grunnar, eru felags um, serliga tí einki greitt amboð finst til at gera skilnað ímillum "rættar" og "skeivar" íløgur, verður sagt í tíðindaskrivi.

Leiðslan á Føroya Lívstrygging fer á fyrstkomandi nevndarfundi at leggja fram leiðreglur um ein etiskan íløgupolitikk.

sansir.fo

## STARVSFÓLK TIL RADIODEILDINA HJÁ FT NET

### Søkt verður eftir starvsfólki til Radiodeildina hjá FT Net

Radiodeildin hjá FT Net hevur høvuðssæti hjá Føroya Tele í Hoyvík, men arbeiðið verður gjørt um alt landið. Nógv útgerð hjá FT Net stendur í náttúruvøkrum umráðum víða um landið, tí er starvið sermerkt á tann hátt, at tú arbeiðir við hátøkni, samstundis sum tú fært møguleikan fyri at vera nógv úti í náttúruni.

Vit kunna bjóða einum komandi starvsfelaga eitt arbeiðsumhvørvi við nógvum spennandi og fjølbroyttum tekniskum uppgávum, har góðir møguleikar eru fyri persónligum og fakligum avbjóðingum í einum mennandi umhvørvi.

**Starvsinnihald**
Sum starvsfólk á radiodeildini verður tú við til at menna og reka tráðleysar skipanir í tøttum samstarvi við tínar starvsfelagar.

Arbeiðið fevnir um allar tráðleysar skipanir, so sum:
- Mikrobylgju-linkar
- Tráðleysu skipanirnar WiMAX og WiFi
- Sjónvarps- og útvarpssendinet
- Mastra- og antennuskipanir
- Fartelefonkervið GSM

**Førleikakrøv**
Vit ímynda okkum, at tú hevur viðkomandi tekniska útbúgving sum t.d. elektronikkmekanikari, elektronikkteknikari, diplom verkfrøðingur ella viðkomandi fakligar royndir.

Umframt hetta vænta vit, at tú ert:
- ágrýtin og hevur hug at taka við tekniskum avbjóðingum
- dugir væl at arbeiða bæði sjálvstøðugt og í samstarvi við onnur
- dugir væl at arbeiða við teldum og telduforritum
- ert væl fyri likamliga, sum t.d. at ganga í haganum, tá farið verður at arbeiða í radiosmáttum og mastrum

**Umsókn og treytir**
Starvið verður sett 1. apríl ella skjótast gjørligt. Lønin verður ásett samsvarandi royndum og útbúgving.

Fleir upplýsingar fáast hjá Jóhan Poulsen, leiðara á Radiodeildini tel 243649 ella á Starvsfólkadeildini á tel 303030.

Umsóknir skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 22. februar 2008, og tær skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postsrúm 27
110 Tórshavn
ella starvsfolkadeildin@ft.fo

Føroya Tele er ein fyritøka í stórum vøkstri, sum eftir fáum árum hevur ment seg til eina effektiva og nútímans fyritøku, ið er kappingarfør á øllum økjum. Vit hava sett okkum fyri at menna nýggjar tænastur og bjóða føroyska marknaðinum bestu tænastuna og nýggjastu tøknina. FT Samskifti er dótturfelag í samtakinum Føroya Tele. Í FT Samskifti starvast 100 fólk, og fyritøkan tekur sær av marknaðarføring, sølu, tænastu, kundarøkt og samskifti við privat- og vinnukundar hjá Føroya Tele.

FØROYA TELE